# Nógv dýrari at hyggja at parabol í Føroyum

**Tey, sum hava parabol skulu nú eisini betala mvg og harafturat skal gjaldast eyka fyri DR 1 og DR 2. Men Canaldigital hevur eitt gott tilboð til føroyingar afturfyri**

FYLGISSVEINA-SJÓNVARP
*Áki Bertholdsen*



*Tað kostar alsamt meiri og meiri at hyggja í sjónvarp. Tey, sum hyggja at fylgissveinasjónvarpi mugu nú tríva djúpari í lumman, men afturfyri fáa tey nú eitt gott tilboð*

Allir teir túsundtals føroyingarnir sum hava parabol, skulu nú fyrireika seg til at betala munandi meiri fyri at hyggja at sjónvarpi.

Tí nú skulu vit nevniliga eisini betala mvg av tí, sum tær ymsu rásirnar kosta.

Sostatt skulu 25% hereftir gjaldast av upphæddini, sum tað annars hevur kostað at fáa rásirnar niður úr luftini.

Tað verður frá 1. oktober í ár, at mvg fer at verða kravt av tí, sum rásirnar annars kosta.

Tað er Toll- og Skattstovan í Føroyum, sum hevur kravt, at mvg eisini verður goldið av tí, sum rásirnar kostað og avtalað er nú gjørd við tey, sum bjóða fylgissveinasjónvarp út í Føroyum um, hvussu gjaldið skal krevjast inn.

Eftir, hvat skilst er ein orsøk til hetta tann, at Føroya Tele ætlar sær eisini at bjóða føroyingum fylgissveinasjónvarp og tey, sum fáa sjónvarp frá Føroya Tele, koma at gjalda mvg.

Fyri at kappingin ikki skal vera ójøvn, verður tískil eisini mvg kravt av teimum, sum síggja Canaldigital.

### Eyka fyri DR

Næstan allir føroyingar, sum hava parabol, hava Canaldigital. Millum rásirnar, sum Canaldigital hevur at bjóða føroyingum eru tær báðar almennu donsku rásirnar, DR 1 og DR 2.

Men hereftir verða tær ikki longur við í pakkunum, sum Canaldigital fer at selja.

Frá 1. oktober verða DR 1 og DR 2 í einum pakka fyri seg sjálvan, sum tey, ið vilja hava hesar rásir, skulu gjalda eyka fyri.

DR 1 og DR 2 fara at kosta beint omanfyri 2.062 krónur um árið, við mvg. Hetta er tað sama, sum hyggjaragjaldið í Danmark er.

Peter From, umboðsmaður hjá Canaldigital, sum í hesum døgum er í Føroyum, sigur, at Danmarks Radio heldur, at teir føroyingar, sum síggja DR 1 og DR 2, eiga at gjalda tað sama sum teir donsku hyggjararnir gjalda.

– Men so halda vit tað eisini vera sjálvsagt, at fer nakar annar at bjóða DR 1 og DR 2 út í Føroyum, verður tað undir somu treytum, sum vit hava fingið, sigur Peter From.

Í Danmark betala viðskiftafólkini hjá Canaldigital mvg, ella moms, sum tað eitur á donskum.

### Eitt gott tilboð

Canaldigital vil ikki upplýsa, hvussu nógv viðskiftafólk tað hevur í Føroyum, men ein vælkvalifiserað meting sigur, at tað liggur omanfyri 6.000 krónur.

Tey, sum hava allar rásirnar hjá Canaldigital, tað, sum tey nevna “Entertainpakkan”, rinda 2.828 krónur um árið, sum er. Men nú mvg kemur afturat, kemur gjaldið upp á 3.535 krónur. Sostatt fer “Entertainpakkin” at kosta góðar 707 krónur meir í mvg.

Tey, sum hava tann bíligara Familypakkan, har tey ikki síggja tær tríggjar Canal + rásirnar, betala, sum er, 1.260 krónur um árið. Tey koma hereftir at betala 1.575 krónur, ella 315 krónur meiri.

Men tann, sum so vil hava DR 1 og DR 2 afturat, skal sostatt hereftir betala 2.062 krónur afturat um árið.

Fyri at viga upp ímóti hesum, fer Canaldigital nú undir eina lýsingaherferð í Føroyum, har teir hava eitt gott tilboð til føroyingar.

Lýsingaherferðin byrjar 1. oktober og varar tað, sum eftir er av árinum. Peter From vil ikki enn siga, hvat tilboðið er, men aðrastaðni hava vit fingið upplýst at tá fara parabolkassar at fáast til keyps fyri slakar 1.500 krónur.

# Alfred roknar eina hálva milliard skeivt

**– Tíbetur er roknistykkið hjá næstformanninum í sambandsflokkinum heilt við síðina av, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

LANDSKASSA-ROKNSKAPUR
*Áki Bertholdsen*



*Roknistykkið hjá Alfred Olsen er áhugavert- men tíbetur púra skeivt, sigur Karsten Hansen*

Karsten Hansen, landsstýrismaður heldur lítið um roknistykkið hjá næstformanninum í sambandsflokkinum í Dimmalætting nú ein dagin.

Har hevði Alfred Olsen, roknað seg til, at landskassans í ár fór at hava eitt undirskot upp á ímillum 300 og 400 mió. krónur.

– Hetta er ein áhugaverd útrokning, men hon er tíbetur púrasta skeiv, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at nýggjasta metingin hjá Fíggjarmálaráðnum vísur tvørturímóti, at landskassin í ár fer at hava eitt avlop upp á 100 - 150 millónir krónur.

– Tað vil siga, at Alfred Olsen skjýtur 450 mió. ella nærum eina hálva milliard krónur við síðuna av. leggur hann afturat.

### Púrasta misskilt

Karsten Hansen sigur, at tað, sum Alfred Olsen púrasta hevur misskilt, er, at hann tekur tølini fyri fyrra hálvár í ár og faldar tey við tvey og so kemur hann fram til, at undirskotið hjá landskassanum í ár verður 300-400 milliónir.

– So einfalt er roknistykkið ikki, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at tað er stórur munur á, hvussu útreiðslurnar hjá landskassanum ígjøgnum árið fella og tað er eisini stórur munur á, hvussu inntøkurnar fella.

– Eitt nú vita vit, at inntøkurnar av partafelagsskattinum og rentuskattinum koma ikki, fyrrenn í seinnu helvt í ár.

Hinvegin vita vit eisini, at vit hava goldið 200 milliónir í rentu av statsláni og vit hava goldið fyrsta gjaldið upp á 89 milliónir til nýggja suðuroyarskipið.

– Hetta eru gjøld, sum fella í fyrra hálvárið, men sum eru galdandi fyri alt árið og Karsten Hansen sigur, at fleiri slík dømi eru.

### Hækka slakar 200 milliónir

Karsten Hansen sigur, at tá ið mett verður um roknskapin hjá landskassanum, eiga vit at leggja upp fyri, at útreiðslur og inntøkur ikki fella javnt yvir alt árið.

–Tí ber heldur ikki til at samanbera tøl fyri fyrra hálvár við tølini fyri seinna hálvar.

– Skal nøkur meting gerast við skili í, er tað rættast at samanbera 1. juli í ár við 1. juli í fjør.

Hann sigur, at í juli í fjør átti landskassin 1.866 milliónir í Landsbankanum, men 1. juli í ár er gjaldið komið upp á 2.048 milliónir.

Talan er sostatt ein hækking uppá knappar 200 mió. krónur og ikki eina lækking uppá 400 milliónir, sum Alfred Olsen vil vera við.

Landskassin átti 1. januar í ár 2.458 milliónir í Landsbankanum og mett verður, at talið verður á leið tað sama 1. januar komandi ár, men hetta er eftir, at avdráttur er goldin av landskassans skuld fyri 2002.

At enda upplýsir Karsten Hansen, at hesi seinastu fýra árini eru umleið 800 milliónir goldnar av skuldini hjá landskassanum.

Útfrá sínum egna roknistykki, legði Alfred Olsen sostatt eisini upp til, at var samgongan ábyrgdarfull, legði hon eina fíggjarlóg fram, har almennu útreiðslurnar vórðu lækkaðar

– Tað er tað ongin orsøk til, sigur Karsten Hansen. Men sjálvsagt miðja vit eftir at tálma útreiðslunum, og tað haldi eg, at allir politikarar eru samdir umeisini sambandsfólk.



# Eitt »øðrvísi« par

**Tey, sum týsmorgunin komu á gátt hjá Anne-Lene og Peter Olofson at heilsa teimum á silvurbrúdleypsdegnum, gjørdust ikki sørt ovfarin. Silvurbrúðarparið var ikki sum væntað hátíðarklødd, men »høvdu latið seg í« og sóu nærmast út sum grýlur í føstu**

SKEMT OG ÁLVARA
*Rúna Sivertsen*

Peter Olofson kenna vit øll, so mikið hevur hann gjørt um seg, síðani hann kom til Føroyar. Men tað, Peter er kendur fyri, er mest tað álvarsliga.

At Peter eisini dugir at skemta, fingu tey at sanna, sum týsmorgunin komu at heilsa honum og konuni, Anne-Lene, nú tey høvdu verið gift í 25 ár.

Tey høvdu »klædt sig ud« sum danir siga. Anne-Lene í eini alt ov lítlari mynsturbundnari troyggju og ternutum skjúrti. Turriklæðið, Anne-Lene hevði á høvdinum, setti prikkin yvir i’ið. Peter í reyðhúgvu, stúku og ullintum undirbuksum líktist ikki prestinum, tey flestu kenna.

Tað var fyri næmingum og lærarum á HF-skúlanum og øðrum, sum komu at syngja fyri teimum silvurbrúðarmorgunin, Anne-Lene og Peter høvdu »pyntað« seg.

- Da de ville overraske os, ville vi også overraske dem, segði Anne-Lene, tá Sosialurin slóg upp á tráðin hjá silvurparinum seinnapartin týsdagin.

Tað var Peter, ið tók telefonina, tá vit ringdu, men hann var skjótur at lata Anne-Lene hornið.

Hvør teirra var meistari fyri sjáldsomu brúðarklæðunum, sigur søgan einki um.

### Ferð til Pólands

Í silvurbrúðargávu frá for eldrunum hjá Peter, fingu tey eina ferð. Ætlan teirra var at fara til Ísrael, men av tí, at har er so ófriðarligt, gjørdu tey av at fara til Pólands í staðin. Saman við børnunum, Thomas 22, Silas, 18 og Line 14 ár, hava tey verið á kurhotelli í Pólandi.

Familjan Olofson kom aftur til Føroya til ólavsøku.

Men familjan í Danmark var ikki við sviðu soð; á vegnum heimaftur steðgaðu tey á í Danmark — og á somu matstovu, sum Anne-Lene presenteraði Petur fyri familju sínari fyrstu ferð, tann dagin hon fylti 25 ár, varð familjan aftur bjóðað. Hesuferð var borðið sjálvsagt størri.

Sjálvan silvurbrúdleypsdagin høvdu Anne-Lene og Peter opið hús í Bøgøtu í Klaksvík.

### Fjórðings føroyingur

Anne-Lene er av føroyskari ætt. Omma hennara á faðirsíðu var føroyisk og hevði Midjord til eftirnavn. Hetta navnið, helt omma hennara vera so vakurt, at hon kallaði børn síni við sínum eftirnavni.

Anne-Lene ferðaðist sum ung genta í Føroyum, og minnist aftur á tíðina, tá leguhúsið á Kamsdali var einasta húsið har.

- Tá eg í 1971 var á legu á Kamsdali, hugsaði eg ikki, at hetta einferð fór at verða ein lítil býir við einum studentaskúla, har eg sjálv kom at verða lærari.

Anne-Lene og Peter hava búð 13 ár í Føroyum. Tey trívast væl í her, siga tey.

- Í Føroyum finnast dygdir eg sakni í Danmark. Her kanst tú vera tann, tú ert, og her er pláss fyri teimum, sum eru øðrvísi, sigur hon.

- Klaksvík er en dejlig by og her bor søde mennesker, sigur Anne-Lene at enda.

Í løtuni starvast Anne-Lene sum lærari á HF-skúlanum í Klaksvík og á Kambsdali. Peter arbeiðir hálva tíð í laksi og hálva tíð við prestavirksemi.




*Anne-Lene og Peter Olofson ílatin sum »sig hør og bør«.*




*Tað vóru ikki Anne-Lene og Peter, sum vórðu tikin á bóli týsmorgunin. Til stóra frøi fyri tey, sum vóru komin at syngja fyri silvurbrúðarparinum, høvdu tey »klædt sig ud«. Ullintu undirbuksirnar hjá Olofson síggjast ikki á myndini, men hann riggaði væl í teimum, sigst.*





Okkara rokning tekur teg ikki av fótum

petur & petur • 320870

Skalt tú hava turrgóðs og sendingar sum eru upp til 3 m³ ella upp til 1 tons - til ella úr Føroyum á skjótasta hátt - tosa so fyrst við Smyril Line. Tí við Smyril Line Express er tað bæði skjótt og lætt.

Í Danmark hava vit farmastøðirnar í Kolding, Hedehusene og Hanstholm. Tær eru allar mannaðar við serkønum fólki, ið svara og loysa øll ivamál um farm og flutning.

Her verður allur farmurin latin inn, og Smyril Line skipar fyri flutningi frá farmastøðunum og líka til Føroya. Lat t.d. vøruna inn í Hanstholm leygardag og hon er longu í Tórshavn mánamorgun.

Við føstum prísi veitst tú altíð, hvat tað kostar at flyta eina vøru við Smyril Line Express. Ring til okkara - vit eru til reiðar at hjálpa.

www.smyril-line.com

SMYRIL LINE

SMYRIL LINE CARGO
Jónas Broncksgøta 35 - 100 Tórshavn
Tel 34 59 60 • Fax 34 59 52